

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 05 - 2013

# Eldborg partur av Statoil-menning í Eysturafrika

Tað var fyrr í ár, at føroyska Skansi Offshore kundi skriva undir sína fyrstu avtalu uttan fyri Norðsjógvin. Eldborg kundi sum tað fyrsta av Skansi skipunum fara suður um Ekvator at arbeiða fyri Statoil í spildurnýggja gasslandslutinum eystan fyri Tanzania. Nú sær ikki mætari út enn, at Statoil sær hetta økið sum eitt av sínum kjarnuøkjum í framtíðini og hevur keypt seg inn í tvey loyvi aftrat. Hvørvítt hetta fer at dryppa á føroyska reiðaríið sigur søgan enn einki um, men tað er í hvussu er gott at kunna vera partur av leiting og útbygging í einum øki, sum er so lovandi. Hetta man leiðslan í Skansi Offshore ivaleyst eisini hava skrivað sær bak oyrað. Statoil, sum hevur fingið nógv burtur úr leitingini út fyri Tanzania, sær henda nýggja olju- og gasslandslutin at verða ein av teimum mest týðandi kring heimin komandi árini. Felagið hevur funnið stórar mongdir av gassi í trimum av fýra brunnum og fer komandi árini at standa fyri fleiri boringum, har tað bæði fer at bora metingar- og avmarkingarbrunnar á verandi feltunum og eisini nýggjar leitibrunnar. Talan er um eitt spildurnýtt øki í olju- og gasshøpi og verður miðjað móti at fara undir útbygging komandi árini. Verkætlanin er so mikið stór, at hon er tvífalt so stór sum gassútbyggingin á Melkøya í Norðurnoregi. Ætlan er at flyta gassið higani til svanga asiatiska marknaðin. Eisini føroyingar eru við í hesi spennandi verkætlan. Eldborg hjá Skansi Offshore arbeiðir í løtuni fyri Statoil á leiðunum út fyri Tanzania. Sáttmáli er gjørdur fyri longri tíðarskeið og er hetta tann fyrsti av slíkum slag, har Skansi Offshore arbeiðir uttanfyri Norðsjógvin. Myndir Boriskipið Ocean Rig Poseidon út fyri Eysturafrika Eldborg tll arbeiðis ut fyri Eysturafrika